# Umsókn um læruplássgóðkenning

| **Yrki og sergrein** | **Húsasmiður** |
|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn á virki | | | |
| Heimstaður | | Telefon | |
| V-tal | | T-postur | |

| | |
|---|---|
| Umsóknin fevnir um deild | |
| Annað virksemi hjá fyritøkuni | |
| Dagligur leiðari | |
| Ábyrgdari av verkligu læruni hjá lærlingum | |
| Hevur virkið fleiri arbeiðsstaðir? | |

| | |
|---|---|
| Tal av starvsfólkum | |
| Yrkislærd í føstum fulltíðarstarvi sum húsasmiður | |
| Útlærdir húsasmiður við meiri enn 3 ára starvsroyndum | |
| Hevur fyritøkan áður havt læruplássgóðkenning | |

***Gev gætur:***

*1. Skrásetingarprógv fyri skráseting í vinnuskránni skal leggjast við*

*2. Læru- ella sveinabræv hjá ábyrgdara av verkligu upplæruni hjá lærlingum skal leggjast við. Er eingin í føstum fulltíðarstarvi við hesi útbúgvingini, skal virkið gera viðmerking um hetta niðanfyri.*

| Stutt lýsing av virkseminum hjá fyritøkuni, og tær vørur og tænastur sum fyritøkan veitir. Eisini kunnu møguligar aðrar viðkomandi upplýsingar í samband við umsókn um læruplássgóðkenning tilskilast her. |
|---|
| |

**Uppgávur, lærlingurin kemur at takast við**

Fyri at virkið kann góðkennast sum lærupláss til lærling, sum fer í læru til *húsasmið*, er neyðugt, at lærlingur arbeiðir við niðanfyristandandi virksemi

Upplýs tí hvat virksemi lærlingarnir sleppa at arbeiða við.

- Hugtakið "Javnan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum eru rutina hjá virkinum
- Hugtakið "Sjáldan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum verða gjørdar av virkinum, men sum ikki eru rutinuuppgávur
- Hugtakið "Ongantíð" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum als ikki verða gjørdar av virkinum

| **Virksemi** | **Javnan** | **Sjáldan** | **Ongantíð** |
|---|---|---|---|
| Nýbygging | | | |
| Umbygging | | | |
| Umvæling | | | |
| Framleiða og seta upp takkonstruktiónir v/meira | | | |
| Framleiða og seta upp veggjakonstruktiónir v/meira | | | |
| Seta í vindeygir og hurðar | | | |
| Klæða loftir og veggir | | | |
| Bjálva | | | |
| Leggja gólv á | | | |
| hallmáta og hæddarmáta øki, áseta kotur og vatnrættar og loddrættar linjur og velja mátitól | | | |
| innrætta eitt byggipláss við atliti at arbeiðsumhvørvi, trygd, gonguvegum, ruskskiljing, veðurviðurskiftum og trivnaðarhentleikum | | | |
| luttaka í fyribyrgjandi trygdararbeiði og í fyriskipanini av hesum á arbeiðsplássinum | | | |
| lesa vegleiðingar og trygdarvegleiðingar | | | |
| gera mongdarútrokningar av tilfari | | | |
| gera hondtekningar og skitsur | | | |
| samskifta við viðskiftafólk | | | |
| meta um dimensiónir, tilfar, amboð og trygdarútgerð | | | |
| leggja út undirsløg | | | |
| evna til og byggja upp útvegg við klædningi, seta upp klædning á skjøldur og evna til vindskeiðir, úthang og takskegg | | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| snøra upp, avbinda, evna til, byggja upp yvirtrom | | | |
| leggja ymisk sløg av tróðri | | | |
| veksla út, seta takvindeygu í og arbeiða við inndekningum til ymisk taksnið | | | |
| evna til og leggja skottrennu | | | |
| lekta eina yvirtrom til ávís tøk | | | |
| evna til takverk við takskeggi og skálkum | | | |
| seta í innhurðar og úthurðar og vindeygu við tilsetningum, inndekningum og fugum | | | |
| byggja upp og klæða innanveggir | | | |
| byggja upp gólv og veggir í einum vátrúmi | | | |
| leggja trægólv við parket ella brettum og øðrum líknandi tilfari | | | |
| seta upp loft og undirlag til loft | | | |
| seta upp fast innbúgv | | | |
| vísa ávísan kunnleika til at seta upp trappur | | | |
| umvæla rotskaðar og soppaskaðar. | | | |

Harafturat skal næmingurin hava kunnleika til siðbundna føroyska byggilist, so sum flagtekja og triðingsreising. Eisini skal næmingurin kenna til ymisk sløg av betongi og hava innlit í kloakkviðurskifti og rørviðurskifti

**Aðrar uppgávur**

| Upplýs møguligar aðrar uppgávur, ið lærlingur fær lærutíðini | Javnan | Sjáldan | Ongantíð |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

Umsóknin verður løgd fyri Yrkisnevndina, at taka støðu til.

Í sínum metingum um virkið kann fáa góðkenning sum lærupláss, leggur Yrkisnevndin dent á:

1. at yrkislærd fólk er á staðnum, við samsvarandi útbúgving og minst 3 ára arbeiðsroyndum, kann standa fyri upplæringini
2. at virkið javnan fremur allar tær týdningarmestu arbeiðsuppgávurnar, sum hoyra til viðkomandi yrkisgrein
3. at virkið hevur ta útgerð, sum eru neyðug fyri at kunna útinna arbeiðsuppgávurnar smb. pkt. 2.
4. at virkið lýkur treytirnar um arbeiðsumhvørvi, sum eru ásettar í lógum og reglum um gott og trygt arbeiðs - umhvørvi.

Góðkenning av virki sum lærupláss verður latin fyri 5 ár í senn.

Viðgerðin av umsóknini um læruplássgóðkenning tekur støði í reglugerð um góðkenning av læruplássum, sum Yrkisnevndin samtykti 4. mai 2006. Partur av viðgerðini kann eisini vera ein sýnsmeting. Lógargrundarlag: Løgtingslóg nr 94 um yrkisútbúgvingar frá 1998

Fyritøkan váttar við síni undirskrift, at givnu upplýsingarnar eru rættar og í samsvari við galdandi ásetingar á Yrkisútbúgvingarøkinum. Fyritøkan váttar samstundis, at tað er kunnugt við galdandi lóggávu á økinum og við innihaldið í viðkomandi útbúgvingarkunngerð, og at tað er ført fyri at nøkta ásettu krøvini við atliti at upplæringini innan viðkomandi yrkisgrein.

__________________________ ___________________________________

*Dagfesting* *Undirskrift virkisleiðarans*

.

Umsóknin skal sendast til: **yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo**

Umsóknin verður løgd fyri Yrkisnevndina, at taka støðu til

**Útbúgvingarkunngerðin, vísur á førleikamálini í kapittul 3:**

**Førleikamál við útbúgvingarlok**
**§ 9.** [1)] Førleikarnir, ið næmingurin skal hava ognað sær við útbúgvingarlok, eru, at hann dugir:
1) At hallmáta og hæddarmáta øki, áseta kotur og vatnrættar og loddrættar linjur og velja mátitól,
2) at innrætta eitt byggipláss við atliti at arbeiðsumhvørvi, trygd, gonguvegum, ruskskiljing, veðurviðurskiftum og trivnaðarhentleikum,
3) at luttaka í fyribyrgjandi trygdararbeiði og í fyriskipanini av hesum á arbeiðsplássinum,
4) at lesa vegleiðingar og trygdarvegleiðingar,
5) at gera mongdarútrokningar av tilfari,
6) at gera hondtekningar og skitsur,
7) at samskifta við viðskiftafólk,
8) at meta um dimensiónir, tilfar, amboð og trygdarútgerð,
9) at leggja út undirsløg,
10) at evna til og byggja upp útvegg við klædningi, seta upp klædning á skjøldur og evna til vindskeiðir, úthang og takskegg,
11) at snøra upp, avbinda, evna til, byggja upp yvirtrom,
12) at leggja ymisk sløg av tróðri,
13) at veksla út, seta takvindeygu í og arbeiða við inndekningum til ymisk taksnið,
14) at evna til og leggja skottrennu,
15) at lekta eina yvirtrom til ávís tøk,
16) at evna til takverk við takskeggi og skálkum,
17) at seta í innhurðar og úthurðar og vindeygu við tilsetningum, inndekningum og fugum,
18) at byggja upp og klæða innanveggir,
19) at byggja upp gólv og veggir í einum vátrúmi,
20) at leggja trægólv við parket ella brettum og øðrum líknandi tilfari,
21) at seta upp loft og undirlag til loft,
22) at seta upp fast innbúgv,
23) at vísa ávísan kunnleika til at seta upp trappur, og
24) at umvæla rotskaðar og soppaskaðar.

*Stk. 2.* Harafturat skal næmingurin hava kunnleika til siðbundna føroyska byggilist, so sum flagtekja og triðingsreising. Eisini skal næmingurin kenna til ymisk sløg av betongi og hava innlit í kloak- og rørviðurskifti.

Les meira í kunngerðini her